# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 14-09-2021 |
| Mál nr.: | 21/17106 |
| Málsviðgjørt: | HI |
| Ummælisfreist: | 29 sep. 2021 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tinglýsing**
(Tinglýsing av skjølum í persónbókini sbrt. ásetingum í øðrum lógum enn tinglýsingarlógini o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 1. mai 1973, løgtingslóg nr. 37 frá 29. mai 1985, løgtingslóg nr. 39 frá 5. mai 1987, løgtingslóg nr. 59 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 2005, § 3 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, § 1 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 70 frá 15. mai 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 43, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Skjøl, ið ikki skulu tinglýsast sbrt. ásetingunum í kap. 6 a, og sum antin viðvíkja persóns ræði á leysafæ ella á ognarvirðum hansara yvirhøvur, og sum eftir niðanfyri standandi reglum ella aðrari lóggávu krevja tinglýsing, verða førd inn í eina serstaka persónsbók."

**2.** Í § 43, stk. 6, verður "sbrt. § 1" broytt til "sbrt. stk. 1" og "nr. 1-7" broytt til "nr. 1-8".

**3.** Í § 47 d, stk. 2, verður "veðhavara" broytt til "veðsetaran".

**4.** Í § 47 e, stk. 2, verður "veðhavaran" broytt til "veðsetaran".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Orsøkin til lógaruppskotið er, at § 27 í uppskotinum til løgtingslóg um framtíðarfulltrú ásetur, at framtíðarfulltrúir ikki fáa gildi, fyrr enn tær eru tinglýstar í persónbókini:

> "*Avgerðir hjá Familjufyrisitingini um íverksetan, afturkalling, broyting ella steðg av framtíðarfulltrú hevur gildi frá teirri løtu, at avgerðin er tinglýst í persónbókini.*"

Samsvar er ikki millum § 27 í lógaruppskotinum um framtíðarfulltrú og § 43, stk. 1, í tinglýsingarlógini, sum ásetur, at skjøl nevnd í 7. kapitli í tinglýsingarlógini kunnu tinglýsast í persónbókini, sbr. orðingina *niðan fyri standandi skjøl*. Framtíðarfulltrúir eru ikki nevndar í 7. kapitli í tinglýsingarlógini. Til at fáa samsvar millum lógina um framtíðarfulltrú og § 43, stk. 1, í tinglýsingarlógini krevst ein lógarbroyting.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í § 43, stk. 1, í tinglýsingarlógini er ásett:

> "*Skjøl, ið ikki skulu tinglýsast sbrt. ásetingunum í kap. 6 a, og sum antin viðvíkja persóns ræði á leysafæi ella á ognarvirðum hansara yvirhøvur, og sum **eftir niðanfyri standandi reglum** krevja tinglýsing, verða førd inn í eina serstaka persónsbók.*"

Orðingin "*eftir niðanfyri standandi reglum"* vísir til 7. kapittul, sum hevur ítøkiligar ásetingar um tinglýsing í persónsbókini av:

- veðbrøvum, sum geva undirveð í ávísum leysafælutum (§ 47)
- undirveði í alifiski og smolti (§ 47 c)
- virkisveði (§ 47 d)
- avgerð um verjumál sbrt. § 6 í verjumálslógini (§ 48)
- hjúnasáttmálum (§ 49)

Í 7. kapitli í tinglýsingarlógini er eingin áseting um tinglýsing av framtíðarfulltrúum, og tí er ikki samsvar millum tinglýsingarkravið sambært lógini um framtíðarfulltrú og orðingina "*eftir niðanfyri standandi reglum"* í § 43, stk. 1, í tinglýsingarlógini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa samsvar millum lógina um framtíðarfulltrú og tinglýsingarlógina.

§ 43, stk. 1, í donsku tinglysningsloven (LBK nr. 1075 af 30/09/2014) er orðað soleiðis:

> "*Dokumenter, der hverken skal tinglyses efter reglerne i kapitel 6 a eller 6 b, og som enten angår en persons rådighed over løsøre eller over en persons formue i almindelighed, skal tinglyses i de tilfælde, der er nævnt nedenfor,* ***samt hvor det i øvrigt er bestemt i lovgivningen***."

Danska ásetingin fevnir sostatt eisini um tinglýsingarásetingar í øðrum lógum enn sjálvari tinglýsingarlógini. Hetta varð longu ásett í donsku tinglýsingarlógini, tá ið danska *lov um fremtidsfuldmagter* varð sett í gildi í Danmark í 2017, og tí kravdust ongar broytingar í donsku tinglýsingarlógini í tí sambandi.

Vísandi til samanberingina av føroysku og donsku tinglýsingarlógini verður skotið upp at seta orðingina *"ella aðrari lóggávu"* inn í § 43, stk. 1. Á henda hátt fæst samsvar millum tinglýsingarlógina og lógina um framtíðarfulltrúir. Eisini slepst undan at broyta tinglýsingarlógina, um onnur lóggáva í framtíðini fer at áseta, at onnur skjøl skulu tinglýsast í persónbókini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið ger greitt, at skjøl eisini kunnu tinglýsast í persónbókini sambært aðrari lóggávu enn tinglýsingarlógini, og at 7. kapittul í tinglýsingarlógini (§§ 47-49) ikki út í æsir ásetur, hvat ið kann tinglýsast.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Tær væntaðu inntøkurnar av tinglýsingargjaldi (1.000 kr. fyri skjalið) verða mettar at verða 6-10.000 kr. Sí pkt. 2.2 niðanfyri.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Tinglýsingin skal málsviðgera framtíðarfulltrúir og onnur skjøl, sum í framtíðini verða kravd tinglýst sambært aðrari lóggávu. Í Danmark vórðu 607 framtíðarfulltrúir tinglýstar (*aktualiserede*) í 2020. Mett verður, at um 2-4 ár fara 6-10 framtíðarfulltrúir at verða tinglýstar um árið.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Eingin millumtjóða sáttmáli er á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Eingin tvørgangandi millumtjóða sáttmáli er á økinum.

**2.9. Markaforðingar**

Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn?**

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Nr. 1*

Orðingin “*eftir niðanfyri standandi reglum”* í § 43, stk. 1, í tinglýsingarlógini kann skapa ógreiðu um heimildirnar hjá tinglýsingarmyndugleikanum at tinglýsa skjøl sambært tinglýsingarásetingum í aðrari lóggávu enn tinglýsingarlógini. Orðingin sipar til skjølini, sum nevnd verða í §§ 47- 49, og kann fatast, sum hon út í æsir ásetur, hvat ið kann tinglýsast. Við lógarbroytingini verður heimildargrundarlagið hjá tinglýsingarmyndugleikanum greiðari, tá ið tinglýsast skal sambært aðrari lóggávu, t.d. § 27 í lógini um framtíðarfulltrú.

*Nr. 2*
Rættingar av skeivum og ófullfíggjaðum tilvísingum.

*Nr. 3*
Málslig broyting.

*Nr. 4*
Málslig broyting.

**Til § 2.** Ætlanin er, at lógarbroytingin skal koma í gildi 1. januar 2022, samstundis sum løgtingslóg um framtíðarfulltrú eftir ætlan kemur í gildi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 14. september 2021

**Magnus Rasmussen**

landsstýrismaður

/ Navn á embætisfólki

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Javntekstur

Fylgiskjal 2: Tinglysningsretten statistik 2020